# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Digitalur landsvegur til útheimin

Privata initiativið røkkur ikki altíð á mál í Føroyum, og tí hevur tað almenna søguligani stovnsett virksemi sum t.d. Atlantsflog og Smyrlarutuna til grannalond fyri at tryggja eitt ávíst støði í okkara sambandi við útheimin.

Føroyska fjarskiftisvinnan ásannar, at okkara digitala samband við útheimin ikki er nóg gott, og at tað privata ikki megnar at tryggja tað samband við útheimin, sum skal til, fyri at føroyingar fáa sama internetsamband, sum fólk í Hillerød ella á Frederiksberg, og tí skulu almennir pengar til, um hetta skal gerast veruleiki.

Um føroyskir politikarar halda fram við nýpuritanska hugburðinum, har tað almenna einki má gera, sum hevur við vinnuligan rakstur at gera, so mugu føroyingar bara sláa seg til tols við, at fólkagrundarlagið er ov lítið til at rættvísgera eitt internetsamband sum tey hava í Roskilde. Hetta er nakað tann sama støðan, sum eitt ynski um ordiligt vegasamband hjá einari lítlari bygd, har tað ikki loysir seg at gera ein tunnil, tí at fólkagrundarlagið verður mett at verða ov lítið.

Trýr man hinvegin uppá, at almennir pengar í infrakervi, har tað privata ikki røkkur, er ein sjálvfylgja fyri at tryggja livilíkindi í Føroyum, so dugir ein at síggja tað skilagóða í, at tað almenna tryggjar eina ordiliga bandvídd til útheimin. Eitt slíkt tiltak vil vera tað sama sum at gera ein digitalan landsveg til útheimin. Hetta hevði verið eitt skilagott tiltak fyri føroyska samfelagið sum heild, hóast tað rakstrarøkonomiskt ikki er nóg áhugavert hjá tí privata at tryggja.

Vónandi fær hetta eyguni upp hjá føroyingum fyri, at vit í heimssamfelagnum og í Europa eru tað sama, sum t.d. Dalur er í føroyska samfelagnum. Ein útjaðari, har tær neyðugu infrakervisíløgurnar av mongum verða sæddar sum alt ov stórar í mun til fólkatalið, hóast fólkini, ið har búgva, bert ynskja sær eitt veganet á sama støði sum í miðstaðarøkinum og eitt gott samband við miðstaðarøkið. Júst sum tá føroyingar ynskja sær ein digitalan veg, sum skal vera líka góður sum hjá teimum í Roskilde, og sum skal hava eitt gott fast samband inn á europeiska meginøkið.

Vónandi sær miðstaðarføroyingurin tað dupultmoralska í at forlanga, at tað almenna skal betala fasta digitala sambandið til Europa, sum vegna lágt fólkagrundarlag ikki loysir seg rakstrarliga, tá somu miðstaðarføroyingar halda, at fólkagrundarlagið á Sandoynni er ov lítið til ein undirsjóvartunnil, tí hann ikki ber seg rakstrarliga.

**Sosialurin**

## Hví sigur løgmaður medvitað ósatt

**FINNUR HELMSDAL**
løgtingsmaður



Løgmaður, landsstýrið og harvið samgongan eru komin illa fyri av gongdini í Kyoto málinum. Løgmaður klárar ikki at fáa semju í samgonguni um, at landsstýrið skal senda umheiminum, via donsku stjórnina, fráboðan um, at Føroyar vilja fylgja ásetingunum í Kyoto avtaluni og m.a. avmarka okkara $CO_2$ útlát. Tað er, sum ikki eina ferð Fólkaflokkurin, ið er forðingin. Óli Breckmann er væl ávegis at nýta Kyoto málið sum eitt av fremstu málum sínum í komandi valstríðnum. Nú eru tey, sum vilja staðfesta Kyoto, umhvørvisaktivistar og tað, sum verri er. Tað stendur tí púra greitt, at løgmaður torir ikki at senda fráboðan um Kyoto, tí hann ræðist fyri, at ein slík fer at hótta tætta og treytaleysa samstarvið millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin.

### Skyldar upp á Tjóðveldi

Løgmaðurin vil sjálvsagt ikki standa sum løgmaðurin, ið forðaði fyri, at føroyingar fylgja ásetingunum í Kyoto. Hann hevur tí roynt at villeiða fólk við at siga, at hann fær ikki fleirtal í tinginum fyri, at Kyoto fráboðanin verður send. Hann roynir at billa Føroya fólki inn, at Tjóðveldi er ímóti, at vit taka fult og heilt undir við Kyoto. Løgmaður sigur, at Javnaðarflokkurin er einasta veruliga trygd fyri verjuni av umhvørvi okkara, og at Tjóðveldi samstundis er størsta forðingin. Hví velur løgmaður at siga slíkt, hví lýgur hann medvitað upp á Tjóðveldi. Er hann veruliga so bangin fyri at missa tætta og heita sambandið við Fólkaflokkin?

### Tjóðveldi gingið á odda

Við Hergeiri Nielsen í fremstu røð, hevur Tjóðveldi gingið á odda í stríðnum fyri at verja og varðveita náttúru og umhvørvi okkara. Og tað var Tjóðveldi sum, í februar í ár, legði uppskot fyri tingið, um at landsstýrið, beinanvegin, skuldi boða umheiminum frá, at vit vildu ganga undir treytirnar í Kyoto. Og Tjóðveldi vildi ganga longur enn so. Men hvat gjørdi Javnaðarflokkurin tá, jú hann valdi saman við restini av samgonguni at fella uppskotið við vanligu orðingini: Landsstýrið arbeiðir við málinum. Trupulleikin var bara, at løgmaðurin hevði hvørki skund, visiónir ella ambitiónir á hesum øki. Hann gjørdi tí einki. Hann læt málið upp í hendurnar á einum fólkaflokslandsstýrismanni, sum sjálvandi heldur einki gjørdi. Løgmaður læt í veruleikanum revin ansa gæsnum í hesum føri. Komnir um hálvan september er tað onkur, sum teskar løgmanni í oyrað, at skulu Føroyar hava nakran møguleika at vera við í Kyoto, so skal danska stjórnin hava boð um hetta innan 24. september. Nú vaknar løgmaður. Hann sær fyri, at hann sleppur í søguna óansæð. Antin sum hann, ið slepti sær undan ábyrgdini, ella sum hann ið staðfesti, at føroyingar taka ábyrgdina á seg. Hann leggur eitt uppskot fyri tingið í skundi, yvir skriftin er orðað, men innihaldið ikki skrivað. Annars tættmeskaða ristin á løgtingsskrivstovuni fekk bráliga víðar meskur, og tóma uppskotið hjá løgmanni slapp ígjøgnum. Er tú eitt sindur soleiðis, so vísur tú á, at somu menn, sum avtalaðu spælið um eitt valdømi, teir fingu eisini hetta málið mingulerað gjøgnum tingið. Tað fekk 1. viðgerð, nevndarviðgerð og vups, so var tað samtykt. Øll glað, og samgongan fekk kanska ein hart tiltrongdan fjøður í hattin. Men so spilti Óli Breckmann spælið, hann og flokkur hansara løgdu veto móti at senda fráboðanina til donsku stjórnina. Nú vildu fólkafloksmenn samráðast, langt, langt aftan á deadline. Og eingin fráboðan varð send. Hvat skuldi løgmaðu nú gera? Jú hann fann eina orðing í nevndarálitinum frá umboðnum hjá Tjóðveldinum í Uttanlandsnevndini. Eina orðing um, at flokkurin vil, at uttanríkispolitikkurin kemur á føroyskar hendur soleiðis, at vit sjálvi kunnu taka fulla ábyrgd av m.a. hesum økinum. Hóast Tjóðveldi ikki við einum orði hevur sýtt fyri, at fráboðanin kann verða send, so sigur løgmaður alment, at Tjóðveldi forðar honum at senda fráboðanina. Tjóðveldi vil ikki rætt og slætt ikki, sigur hann.. Kola svørt lygn, men fólk, ið ikki skilja ella hava møguleikan fyri innliti, tey trúgva løgmanni. Hetta hóast Tjóðveldi upprunaliga kom við uppskotinum fyri skjótt níggju mánaðum síðan, og hóast m.a. Vinnuhúsið sigur, at løgmaðurin skuldi havat vaknað tá. Spurdur um hví hann sigur slíkt um Tjóðveldi sigur løgmaður, nei, eg havi ikki álit á Tjóðveldinum. Eg taki ikki Tjóðveldi fyri fult. Tvs at hóast Tjóðveldi hevur lagt uppskot fyri tingið fyri 9 mánaðum síðan, og hóast Tjóðveldi hevur boðað frá, at tikið verður undir við at senda fráboðanina, so vil løgmaður ikki gera tað, tí hann sigur seg ikki hava álit á Tjóðveldinum. Ikki bara frekt og beinleiðis ódemokratiskt, slíkt er at meta sum grov maktmisnýtsla, ið átti at fingið álvarsligar fylgjur fyri løgmann. Løgmaður hevur ikki álit á einum flokki, sum vil verja og bjarga umhvørvinum, sum í veruleikanum er ávegis einari vanlukku. Sami løgmaður hevur fult og heilt álit á flokki, sum drálar við at taka stig til at verja umhvørvið, og sum kallar tey, ið eru sinnað at seta tiltøk í verk, fyri umhvørvisaktivistar. Tað kann tykjast bæði løgið og óskiljandi, at løgmaður ber seg soleiðis at, og er tað vorðin sum sosialdemokratiskur løgmaður.

### Umhvørvið er taparin

Tað er neyvan at taka munnin ov fullan, um ein sigur at løgmaður spælir hasard við umhvørvi okkara, bert fyri at tekkjast Óla Breckmann. Tað kann í hvussu er eingin iva vera um, at umhvørvið er stóri taparin í hesum politiska og taktiska skuggaspælinum. Vit staðfesta, at Jóannes Eidesgaard tekur Fólkaflokkin fram um okkara hótta umhvørvi. Løgmaður vónar kanska, at óreiðiliga fram ferð hansara allíka væl bjargar honum og flokkinum nakrar atkvøður. Men hví undrast og øtast, Kyoto málið er ikki einasta, har løgmaður hevur spælt bæði skugga- og dupultspæl.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.